| TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ<br>26. januar 2011 | Blað nr.:<br>9520 |
|---|---|
| | Formansins merki: |

# GERĐABÓK

**Dato:** **26. januar 2011** **kl. 17.30**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr: 03/12-23/12**

**FUNDARLEIĐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIĐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Bogi Andreasen
Marin Katrina Frýdal
Jógvan Arge
Rúni Djurhuus
Jákup Símun Simonsen
Annfinn Brekkstein
Elin Lindenskov
Vagnur Johannesen
Levi Mørk
Inga Dahl
Sjúrður Olsen

**LUTTÓKU IKKI:**
Maria H. Olsen, sum hevur farloyvi
Vagnur Johannesen, sum hevur farloyvi
Halla Samuelsen, ið er uttanlands

**LUTTÓKU EISINI:**
Jóan Petur Hentze

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

# MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**04/12** **2012-0177**

**Vagnur Johannesen hevur boðað frá, at honum berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.**

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Inga Dahl, eru loknar.

**Býráðið 26. januar 2012:** Samtykt.

**05/12** **2012-0178**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 26. januar 2012:** Tikið til eftirtektar.

**06/12** **2011-0662**

**Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2011**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna tilfarið.

Roknskapurin fyri januar 2011 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2011:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 24. mars 2011:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri februar 2011 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 6. apríl 2011:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 14. apríl 2011**: Einmælt samtykt.

Roknskapurin fyri mars 2011 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 4. mai 2011:**Trivnaðarstjórin greiddi frá útvaldum konto. Einmælt samtykt.

**Býráðið 26. mai 2011:** Einmælt samtykt.

Roknskapurin fyri apríl 2011 verður lagdur fram á fundinum

**Fíggjarnevndin 8. juni 2011:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 16. juni 2011:** Einmælt samtykt.

Roknskapurin fyri mai og juni 2011 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 31. august 2011:** Trivnaðarstjorin greiddi frá útvaldum konto. Framlagt og góðkent.

**Býráðið 8. september 2011:** Einmælt samtykt.

Roknskapurin fyri juli og august 2011 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 26. september 2011:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 29. september 2011:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Roknskapurin fyri september 2011 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2011:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 27. oktober 2011:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Roknskapurin fyri oktober 2011 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. november 2011:** Útsett.

Roknskapurin fyri oktober verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2011:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 14. desember 2011:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Roknskapurin fyri november verður lagdur fram á fundinum.

**Figgjarnevndin 18. januar 2012:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 26. januar 2012:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu og at heita á KSF um at reisa málið um skattamillumverandi millum landið og kommunurnar.

**07/12** **2012-0132**

**Avdráttarskái í 2012**

Ì fíggjarætlanini hjá kommununi fyri 2012 er ikki roknað við at gjalda avdráttir av lánum.
T.v.s. at hesir skulu umfíggjast.

Umsitingin hevur tí kanna møguleikarnar, fyri at fáa avdráttarskáa á tveimum lánum frá Føroya Lívstrygging Og Eftirlønargrunni Havnar arbeiðsmannafelags í 2012.

Lánveitararnir eru sinnaðir til hetta soleiðis, at lánitíðin verður longd samsvarandi.
T.v.s. at árligu lánsgjøldini verða tey somu aftaná avdráttarskáan.

Avdráttirnir eru uppá ialt 11,5 mill. kr.

**Tilmæli:**
Miðfyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla til at taka av tilboðnum um avdráttarskáa í eitt ár.

**Figgjarnevndin 18. januar 2012:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Elin Lindenskov, tekur undir við tilmælinum og mælir býráðnum til at taka av tilboðnum um avdráttarskáa.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Bogi Andreasen, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir býráðnum til at rinda avdráttir av lánunum samsvarandi upprunaligu afturgjaldsavtaluni.

**Býráðið 26. januar 2012**: Útsett.

**08/12** **2011-2863**

**Viðvíkjandi undirskoti á konto 2810 fíggjarligt frípláss**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Sambært løgtingslóg nr. 67 frá 10 mai 200 um dagstovnar og dagrøkt, kann fult ella partvíst fíggjarligt frípláss verða veitt foreldrum, ið ikki sjálvi megna at rinda útreiðslurnar.
Tað vísir seg, at óvanliga nógv foreldur hava søkt um frípláss í 2011. Ein av orsøkunum er, at fleiri foreldur eru farin undir útbúgving. Settar eru kr. 3.500.000 av til frípláss í 2011, men nú tað síðsta útgjaldið er goldið í desember kann staðfestast ein meirnýtsla á kr. 1.365.000.
Fyri at fáa játtanina at javnviga við útreiðslurnar, verður skotið upp at fíggja hetta soleiðis.

| | |
|---|---|
| 3210 Hjálp vegna vantandi barnaansing | kr. 900.000 |
| 3212 Tímar vegna serliga tørv | kr. 228.000 |
| 3312 Summararbeiði hjá skúlaungdómi | kr. 237.000 |
| | kr. 1.365.000 |

Á kontu 3210 er munandi minninýtsla, sum stendst av, at kommunan nærum hevur nøktað tørvin á barnaansing í 2011.
Á kontu 3212 er eisini minninýtsla, og upphæddin, ið mælt verður til at flyta til fíggjarlig frípáss, hevur ikki beinleiðis ávirkan á tænastustigið.
Á kontu 3312 summararbeiði hjá skúlaungdómi eru kr. 237.000 eftir.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á Barna- og ungdómsdeildini mæla til, at
- kr. 900.000 á kontu 3210 hjálp vegna vantandi barnaansing
- kr. 228.000 á kontu 3212 tímar vegna serligan tørv, og
- kr. 237.000 á kontu 3312 summarbeiðið hjá skúlaungdómi

verða fluttar á 2810 fíggjarlig frípláss.

**Mentamálanevndin 14. desember 2011:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at taka undir við tilmælinum.

**Fìggjarnevndin 14. desember 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 14. desember 2011:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 26. januar 2012:** Útsett.

09/11 **2011-2748**

**Mentanarhøli í miðbýnum**.

**Málslýsing:**
Nettojáttanin til Mentanarhøli í Miðbýnum, t.e. rakstur av Perluni, er kr. 0,- í ár, og higartil hava ongar inntøkur verið. Útreiðslur hava verið til hølini, m.a. til at bøta um ljóðviðurskiftini, og sostatt er hall á rakstrarkontu 5312 Mentanarhøli í miðbýnum. Greitt er, at ikki ber til at reka húsið uttan fígging, og til næsta ár eru settar kr. 200 tús. av til rakstur. Vísandi til hetta verður mælt til at flyta kr. 293.000 av kontu 6275 Torg við Perluna og Reinsaríið L62013 til rakstrarkontu 5312.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at flyta kr. 293.000,00 av konto 6275 Torg við Perluna og Reinsaríið L62013 til rakstrarkontu 5312 Mentanarhøli í miðbýnum.

**Mentamálanevndin 30. november 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 14. desember 2011:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 26. januar 2012:** Einmælt samtykt.

10/12 **2010-2852 BH (sí eisini mál nr 2007-3390 og 2011-1170)**

**Skitsuuppskot: Rundkoyring við Argja Skúla á Hamrinum**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við at Argja Skúli verður tikin í nýtslu eftir summarfrítíðina 2011, hevur verið arbeitt við eini ferðsluloysn á sjálvum skúlaøkinum og økinum millum nýggja skúlan og útstykkingina undir Hamrinum á Argjum. Víst verður í hesum sambandi til mál nr. 2007-3390, har niðurstøðan var, at vegaatkoma til og frá skúlaøkinum skal vera frá ætlaðu rundkoyringini.

Umsitingin leggur fram skitsuuppskot og fyribils kostnaðarmeting av rundkoyringini (víst verður til j. nr. 2010-2852/3 og 2010-2852/4.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at taka undir við fyriliggjandi skitsuuppskoti og at rinda metta kostnaðin á 2,5 mió. kr., til liðugtgerð av rundkoyringini, av játtanini til skúlan á Argjahamri og at beina málið um mentamálanevnd og fíggjarnevnd í býráðið. Mælt verður harumframt til at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 10. februar 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um mentamálanevndina og fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 9. mars 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd og mentamálanevndini.

**Býráðið 24. mars 2011:** Einmælt samtykt.

Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 21. juni 2011:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Kommunan hevur boðið arbeiðið út í innbodna lisitatión millum 4 arbeiðstakarar. Lisitatión var hildin 5. juli 2011 og inn komu 2 boð. Lægsta boð hevði sp/f Andreas Berg álj. kr. 2.294.125 (u/mvg). Lisitatiónsprotokol fyriliggur í málinum, j. nr. 2010-2582/12.

Umsitingin hevur latið gera nýggja kostnaðarmeting, j. nr. 2010-2582/17, og sambært hesi meting verður fíggjartørvurin kr. 3.147.877 ella um 3,15 mió kr. Játtaðar eru 2,5 mió kr. og sostatt resta umleið kr.650.000,- í.

Sambært tí av verkætlanarleiðaranum framlagda byggiroknskapi fyri skúlan á Argjahamri, heldur samlaða játtanin fyri skúlan. Ein partur av hesi játtan er ein incitamentspulja á kr. 4.873.602, harav kommunan eigur kr. 1.949.441, sum koma til útgjaldingar frá verkætlanini, um kostnaðurin heldur.

Á hesum grundarlagi, og tí at dentur verður lagdur á at veita skúlabørnum ferðslutryggar atkomumøguleikar til skúlan verður mett, at tað er ein viðkomandi møguleiki, at nýta ein part av kommununnar parti av hesi incitamentspulju, til írestandi fíggingina til liðugtgerð av rundkoyringini.

**Tilmæli.**
Tekniski stjórin og trivnaðarstjórin mæla til, at tikið verður av lægsta tilboðnum frá Sp/f Andreas Berg, at írestandi fíggingin á kr. 650.000 verður fíggjað av

kommununnar parti av incitamentspuljuni frá skúlanum á Argjahamri og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd:** Teldupostur varð sendur til limirnar í teknisku nevnd 22. juli 2011 við fyrispurningi um teir tóku undir við tilmælinum ella ikki. Hesi hava svarað at tey taka undir við tilmælinum .

Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Levi Mørk og Sjúrður Olsen taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 25. juli 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 25. juli 2011:** Einmælt samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 25. juli 2011:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Av tí at málið hevði skund at fáa samtykt og góðkent í býráðnum hin 25. juli 2011, vóru limir í teknisku nevnd umvegis teldubræv bidnir um at taka støðu til tilmælið.

Allir nevndarlimir tóku undir við tilmælinum, og samtyktin skal hervið formliga staðfestast og førast til protokoll.

**Tekniska nevnd 25. august 2011:** Avgerðin varð staðfest av Marin Katrinu Frýdal, Jákup Símun Simonsen og Hallu Samuelsen.

Sjúrður Olsen luttók ikki.

**Býráðið 24. november 2011:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Býráðið 26. januar 2012:** Einmælt samtykt.

**11/12** **2011-0183 KF**

**Uppskot til byggisamtykt fyri Norðradal og Syðradal**

**Lýsing av málinum, samandráttur.**
Býarskipanardeildin hevur gjørt uppskot til byggisamtykt fyri Norðradal og Syðradal. Í dag er eingin byggisamtykt galdandi fyri hesar bygdirnar og tí ber ikki til at byggja ella frábýta øki til sethús her.

Skotið verður upp at brúka ásetingarnar í almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu og leggja nøkur smærri A1-sethúsaøkir saman við verandi bygging í Norðadali og Syðradali.

Eisini hava vit skotið upp at leggja økir av til frítíðarhús í Norðradali og Syðradali.

Av tí at almenna byggisamtyktin ikki hevur nakrar ásetingar fyri frítíðarhús, er uppskot gjørt til orðing av einum F-øki til frítíðar- og summarhús og frítíðarøkir (j.nr. 2011-1731).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at nevndin góðkennir uppskot til byggisamtykt fyri Norðradal og Syðradal sambært kortskjali dagf. 21.07.2011.

Elin Lindenskov var ikki við til hetta mál.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. august 2011:** Nevndin samtykti at senda málið til ummælis hjá eigarum og festarum í økinum.

**Ískoyti:**
Eigarar og festarar í økinum hava havt uppskotið til ummælis og hava onga viðmerking.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at nevndin góðkennir uppskot til byggisamtykt fyri Norðradal og Syðradal sambært kortskjali dagf. 21.07.2011.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. september 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 29. september 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Seinasta freist at mótmæla broytingini av byggisamtyktini fyri Norðradal og Syðradal var 21. november 2011.

Móttikin eru tvey skriv við broytingaruppskotið og viðmerkingum. Poul Hansen, adv. hevur sent broytingaruppskot um staðseting av F-øki vegna nýggju eigararnir av smoltstøðini, P/f Bacalao og P/f Kimbil og Búnaðarstovan hevur sent viðmerkingar um lutfalsliga stóru F-støðini í Norðradali og Syðradali.

Eftir at byggisamtyktin fyri Norðradal og Syðradal var lýst, hevur smoltstøðin skift eigara. Nýggju eigararnir vænta at fara undir okkurt virksemi her í framtíðini og eru bangnir fyri at F-øki møguliga kann tarna hesum virksemi. Tí hava teir eitt uppskot um at flyta F-øki 100 – 150 m eystureftir.

Eftir lýsingina, hevur umsitingin eisini havt munnligt samskifti við ein møguligan nýggjan festara av Kongshaganum (vestara festi í Norðradali). Hesin heitti eisini á kommununa um at flyta F-øki longur eystureftir, tí hann ynskti at nýta økið til stráfóður.

Í viðmerkingini frá Búnaðarstovuni verður víst á, at arbeitt verður ímóti eini intensivari landbúnaðarframleiðslu í Norðradali og Syðradali. Spurnartekin verður sett við, um frítíðarøkið hóskar saman við landbúnaðarfreimleiðslu. Her verður hugsað um taðing, lukt og tílíkt.

Umsitingin vil nú arbeiða við einum broyttum uppskotið til byggisamtykt fyri Norðradal og tosa við partarnar einaferð enn.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2011:** Kunnað varð um málið.

**-Ískoyti:**
Av tí at viðurskiftini har ætlaða F-økið skuldi liggja enn ikki eru komin upp á pláss, mælir Býðarskipanardeildin til, at F-økið verður tikið burturúr byggisamtyktini fyri fyrst. Tá ið viðurskiftini eru komin upp á pláss, kann F-økið staðsetast við eini broyting í byggisamtyktini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at nevndin góðkennir broytta uppskotð til byggisamtykt fyri Norðradal og Syðradal sambært kortskjali dagf. 21.12.2011

**Byggi- og býarskipanarnevndin 9. januar 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

**Býráðið 26. januar 2012:** Einmælt samtykt.

**12/12** **<u>2010-1336 JI</u>**

**<u>Skúladepilin við Marknagil – makaskifti</u>**

**Lýsing av málinum:**
Í sambandi við byggingina av skúladeplinum í Marknagili hevur Landsverk ov lítið av lendi tøkt til at lúka ásetingar í serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil um byggi- og nettonýtslustig. Til tess at lúka hesar treytir, kann kommunan geva Landsverki loyvi til at nýta part av øki kommununar sum grundarlag undir útrokningini av byggi- og nettonýtslustiginum, sbr. serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil § 5, stk. 1. Talan er í høvuðsheitinum um D1 øki.

Kommunan og búnaðarstovan hava umrøtt møguleikan fyri, at kommunan afturfyri henda rætt yvirtekur øki í Sandágerði og traðir/urtagarðsstykki á Ternuryggi fram við Hoydalsá. Talan er um hesi øki:

**Tórshavnar Kommuna letur:**

| | |
|---|---|
| Matr. nr. 1177, til víddar | 16.175 m² |
| Matr. nr. 1174, til víddar | 10.827 m² |
| Part av matr.nr. 1101 og 1100, uml. | 4.090 m² |
| Íalt uml. 31.192 m² | |

**Búnaðarstovan letur:**

| | |
|---|---|
| Matr.nr. 979a, (Sandágerð) | 12.371 m² |
| Matr.nr. 985, (Sandágerð) | 75 m² |
| Matr.nr. 979c, (Sandágerð) | 2.872 m² |

Harumframt letur Búnaðarstovan flestallar traðir og urtagarðsstykki á Ternuryggi fram við Hoydalsá, eftir nærri avtalu og góðkenning frá avvarðandi myndugleika.

Búnaðarstovan kemur tá at lata størri lendi enn kommunan, men økið, ið Búnaðarstovan letur, er meira avmarkað nýtsluliga og kemur at krevja umsiting og eftirlit frá kommununnar síðu, m.a. av leigumálum, men samstundis fær kommunan ræðisrættin á økinum.

**Tilmæli:**
Miðfyrisitingarstjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at taka prinsippavgerð um, at Landsverk kann nýta part av øki kommununnar, matr. nr. 1177, 1174, 1101 og 1100, Tórshavn, sum grundarlag undir útrokningni av byggi- og nettonýtslustiginum ísv. Byggingina av skúladepli við Marknagil.

Samstundis verður mælt til at heimila umsitingini at taka upp samráðingar um endaligar treytir fyri yvirtøku av lendi frá Búnaðarstovuni í Sandágerði og traðir og urtagarðsstykki á Ternuryggi framvið Hoydalsá eftir omanfyristandandi leisti.

Tóri í Hoyvík var við til hetta máli.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. juni 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í fíggjarnevndina.

**Fìggjarnevndin 15. juni 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 16. juni 2011:** Einmælt samtykt.

Samráðingar hava verið við Búnaðarstovuna um makaskifti. Fyri teir umleið 31.192 fermetrarnar kommunan letur til Skúladepulin við Marknagil letur Búnaðarstovan niðanfyristandandi matriklar tætt við Hoydalsá í Hoyvík:

| Matrikul | Fermetrar |
|---|---|
| 58A | 13.601 |
| 61 | 3.699 |
| 62 | 2.402 |
| 63 | 3.088 |
| 64 | 3.973 |
| 1dn | 2.901 |
| 65 | 2.189 |
| Tilsamans | 31.853 |

**Tilmæli**
Miðfyrisitingarstjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at makaskifta sambært omanfyristandandi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 9. januar 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í fíggjarnevndina.

**Figgjarnevndin 18. januar 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og makaskifta sambært omanfyristandandi.

**Býráðið 26. januar 2012:** Einmælt samtykt.

**13/12** **<u>2009-3249</u>**

**<u>Dálking frá Felagfjósinum ÍF Sandá</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Tað verður javnan staðfest dálking, m.a. í Sandá, orsakað av taðing frá Felagsfjósinum ÍF Sandá í Havnadali. Felagsfjósið hevur goymslurúmd í køstinum, svarandi til tøðini frá djóraeindunum, ið fjósið var bygt til. Nærmasta kommunala spillivatnsskipanin í økinum, er tann á Norðasta Horni, men fjósið er ikki knýtt í hesa. Tí hevur kommunan í byggiloyvinum kravt, at setast skuldi ein samlitangi til alt annað spillivatn frá fjósinum, íroknað spillivatn frá framleiðsluni. Mjólkaframleiðskan hevur við sær stórar mongdir av vatni frá sóttreinsan av mjólkimaskinunum. Samlitangin, ið kravdur varð í bygiloyvinum, er ongantíð fingin til vega, m.a. tí at tað hevði ført við sær stórar útreiðslur fyri tøming, tí stóru vantnøgdirnar frá sóttreinsanini føra við sær, at tangi fyllist eftir stuttari tíð.
Síðani fjósið var bygt og tikið í nýtslu, hava bæði tøð og alt spillivatn verið latin í køstin. Hetta hevur ført við sær, at køsturin ikki hevur kunnað rúmað neyðugu nøgdunum, sambært upprunaliga loyvinum. Stóru vatnnøgdirnar, ið lætnar hava verið í køstin, hava ført við sær, at tilfarið í køstinum verður so flótandi, at tað í

mestan mun rennur omaná lendinum, tá tað verður sprænt, og endar í áum og á sjónum.
Heilsu- og umhvørvisdeildin hevur havt fundir við íognarfelagið við tí endamáli, at felagið fær lagt spillivatnsskipan niðan á Norðasta Horn og á tann hátt loyst trupulleikan. Pumpustøð frá lægsta stað, við gomlu brúnna um Sandá er mett at kosta kr. 226.445,-. Útyvir hetta eru útreiðslurnar fyri at binda fjósið og smiðjuna hjá Landsverki í mettar til kr. 37.120,-. Felagið hevur boðað frá, at tað ikki hevur fíggjarligar umstøður at fáa til vega pumpustøð v.m. sum er.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin fyri Heilsu- og Umhvørvissdeildina mæla til, at nevndin:

- tekur støðu til um málið skal beinast í byggi- og býarskipanarnevndina, um at halda fast við kravið í byggiloyvinum ella at íognarfelagið loysir trupulleikan á annan lógligan hátt og at freist verður sett fyri at fáa arbeiðið gjørt.
- í øðrum lagi tekur málið upp við teknisku nevnd um eina loysn.
- í triðja lagi tekur støðu til um nevndin skal mæla býráðnum til at loka virksemið, um ikki felagið alt fyri eitt fær arbeiðið gjørt.

Havast skal í huga, at um so er at kommunan fíggjar part av arbeiðinum, kann tað føra við sær krøv um somu sømdir frá øðrum landbúnaðarvirksemi í kommununi.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 22. november 2011:** Nevndin samtykti at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina, vísandi til at umhvørviskrøvini, ið sett vóru í byggiloyvinum, ikki eru fylgd.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur støðu til um at halda fast við kravið í byggiloyvinum ella at íognarfelagið loysir trupulleikan á annan lógligan hátt og at freist verður sett fyri at fáa arbeiðið gjørt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 9. januar 2012:** Ein minniluti, Elin Lindenskov og Jan Christiansen samtyktu at taka undir við tilmælinum.

Ein annar minniluti, Jákup Símun Simonsen og Levi Mørk mæla til at loysa málið við uppskotinum frá UP Verkfrøði at leggja kloakk fram við landsvegnum við íbinding í kloakkina frá Norðasta Horn.

Ein triðji minniluti, Bogi Andreasen tekur ikki undir við tilmælinum, men mælir til at heitt verður á Í/F Sandá um at koma við ítøkiligari umsókn at taka støðu til.

Marius Müller var ikki við til hetta mál.

**Ískoyti:**
Elin Lindenskov biður um málið á skrá.

**Býráðið 26. januar 2012:** Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Einmælt samtykt at beina málið í umsitingina til avgreiðslu.

14/12 **2010-2007/60 SG**

**Dagstovnurin í Hoyvik**

Fyri eini tíð síðani varð staðfest, at Dagstovnurin í Hoyvik er fongdu av blámusoppi. Royndir vóru tiknar til tess at staðfesta vavið av blámusoppafongdu økjunum. Og út frá hesum varð gjørt útbjóðingartilfar til timburarbeiðið. Arbeiðið verður gjørt í stigum soleiðis, at ein lon verður gjørd í senn.

Samlaða kostnaðarmetingin ljóðaði tá uppá 6,4 mió. u. mvg, sum Húsaumsitingin eftir ætlan skuldi rinda av síni viðlíkahaldsjáttan fyri 2011 og 2010.

Nú veggir, gólv o.a. er niðurtikið kann staðfestast, at vavið av soppafongdu økjunum er munandi størri enn upprunaliga kanningarnar góvu ábending um. Tað er stórt sæð øll lonin, sum er soppafongd. Harumframt kann staðfestast, at fukt treingir upp gjøgnum gólvið. Helst hevur hetta verið so líka síðani bygningurin varð bygdur. Og nógvu lekarnir og soppavøksturin hava eisini viðført, at partar av berandi takkonstruktiónini er rotin og má skiftast út.

Vavið av umvælingararbeiðinum er tí vaksið munandi. Sambært eini dagførdari kostnaðarmeting grundað á vavið av skaddu økjunum, sum staðfest eru í fyrstu lonini, væntast umvælingarkostnaðurin nú at liggja upp ímóti 12 mió. kr. u. mvg.

Tá er framvegis ikki heilt greitt, um tað harumframt verður neyðugt at leggja nýtt takpapp á allan bygningin, og somuleiðis eru trupulleikar við lekum kring yvirljósini, sum ikki eru loystir enn. Hesi ting eru ikki við í kostnaðarmetingini.

Húsaumsitingin hevur ikki fíggjarligar umstøður til at bera ein enn størri part enn tær kr. 6 mió, sum upprunaliga ætlað. Ein loysn er, at írestandi peningurin verður funnin við umraðfestingum á íløguætlanini.

Skal arbeiðið halda fram, er neyðugt at játta meirfígging skjótast.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2011:** Kunnað varð um málið.

**Býráðið fyri læsum hurðum 14. apríl 2011:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 4. mai 2011:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Niðanfyri er yvirlit yvir íløgujáttanir, sum mett verður kunnu vera vit til at fíggja meirkostnaðin av umvælingararbeiðinum.

**Dagstovnur í Hoyvík - meirfíggingartørvur uml. 6 mió kr.**

| | Projektnr. | Upphædd |
|---|---|---|
| **§ 3 Børn og ung** | | |
| Løgukarmur (frítíðarskúli) | - | 1.000.000 |
| FTS í Gula skúla | L31002 | 242.000 |
| **§ 5 Mentan og frítíð** | | |
| Musikkskúlin | L51002 | 3.800.000 |
| Spælipláss í Grasagarði | L53001 | 150.000 |
| Íløgukarmur (badmintonhøllin) | - | 240.000 |
| Tórsvøllur | L57008 | 4.538.000 |
| Ítróttahøllin í Kollafirði | L57011 | 1.500.000 |
| **§ 6 Teknisk mál** | | |
| Íløgukarmur (fríðkan) | - | 331.000 |
| Kongabrúgvin | L62012 | 996.000 |
| Vaglið | L62014 | 997.000 |
| Frílendi til borgaran | L62015 | 217.000 |
| Løgukarmur (kirkjugarðar) | - | 1.000.000 |
| Løgukarmur | - | 396.000 |
| Keyp og søla | - | 1.500.000 |
| **§ 7 Kommunal virkir** | | |
| Útbúnaður á bátaøkinum | L74002 | 5.848.000 |
| | | |
| **Í alt** | | **22.755.000** |

**Mentamálanevndin 18. mai 2011:** Nevndin samtykti at biðja um gjølla frágreiðing um, hvussu tað ber til, at skaðin á húsið er so nógv kostnaðarmeiri enn mett varð í fyrstani.

Nevndin samtykti at mæla býráðnum um fíggjarnevndina til at játtaðar verða umleið 6 mió krónur aftrat til umvælingina av Dagstovninum í Hoyvík soleiðis:

| | |
|---|---|
| Løgukarmur (frítíðarskúli) | 1.000.000 |
| FTS í Gula skúla | 242.000 |
| Badmintonhøllin | 240.000 |
| Keyp og søla | 1.500.000 |
| Húsaumvæling | 2.500.000 |
| B&U økt virks (rakstur) | 500.000 |

**Fíggjarnevndin 24. mai 2011:** Deildarleiðarin í Húsaumsitingini greiddi frá málinum. Samtykt at mæla býráðnum til við eykajáttan at játta tkr. 12.000 av íløgum á konto 3175, barnaansing íløgur.

Íløgan verður fíggjað við niðanfyri standandi flytingum:

tkr.

| | | | |
|---|---|---|---|
| 3175 | FTS, Løgukarmur | Lækking | -1.000 |
| 3175 | FTS, Guli skúli | Lækking | -242 |
| 5775 | Ítróttaranlegg løgukarmur | Lækking | -240 |
| 6175 | Keyp og søla av fastari ogn | Lækking | -1.500 |
| 6110 | Røkt av bygningum | Lækking | -8.518 |
| 3214 | Børn og ung, Umvælingar o.a. | Lækking | -500 |
| 3175 | Dagstovnurin í Hoyvík | Hækking | 12.000 |

**Býráðið 26. mai 2011:** Tikið av skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. juni 2011:** Nevndin samtykti at útseta málið til komandi fund.

**Fìggjarnevndin 15. juni 2011:** Tikið av skrá.

**Býráðið 16. juni 2011:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Húsaumsitingini hava við útgangsstøði í fíggjarstøðuni hjá Húsaumsitingini, mett um hvussu Húsaumsitingin kann luttaka í kostnaðinum fyri heildarumvælingina av dagstovninum í Hoyvík.

Í mun til samlaða metta kostnaðin á kr. 12 mió., metir húsaumsitingin seg kunna átaka sær knappliga 60%, svarandi til 7,0 mió. kr.

Henda upphædd verður fíggjað soleiðis:

Av framfluttum avlopi frá 2010: kr. 4.500.000,-
Flyting av avlopi frá 2010, ætla til Müllers Pakkhús: kr. 300.000,-
Avsett á fíggjarætlan til røkt av bygninginum í 2011: kr. 800.000,-
Flutt frá røkt av Kommunuskúlanum
á fíggjarætlan 2011: kr. 500.000,-
Flutt frá røkt av Hoyvíkar skúla á fíggjarætlan
fyri 2011: kr. 500.000,-
Innanhýsis umraðfesting fyri røkt av dagstovnum kr. 250.000,-
Innanhýsis umraðfesting av røkt av mentunar-
bygningum á fíggjarætlan fyri 2011 (Móttøku-
húsinum og Müllers Pakkhús): kr. 150.000,-
Tilsamans kr. 7.000.000,-

Samlaða fíggingin sum umsitingin sostatt kann vísa á, og írestandi fíggingin er sostatt henda:

**Uppskot frá trivnaðarumsitingini, teknisku umsiting og miðfyrisitingini:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 3175 | FTS, Løgukarmur | Lækking | -1.000 |
| 3175 | FTS, Guli skúli | Lækking | -242 |
| 5775 | Ítróttaranlegg løgukarmur | Lækking | -240 |
| 6175 | Keyp og søla av fastari ogn | Lækking | -1.300 |
| 6110 | Avsett á fíggjarætlan til røkt av bygninginum í 2011 | Lækking | -800 |
| 6110 | Røkt av bygningum | Lækking | -4.500 |
| 6110 | Røkt av bygningum | Lækking | -300 |
| 6110 | Flutt frá røkt av Kommunuskúlanum á fíggjarætlan 2011 | Lækking | -500 |
| 6110 | Flutt frá røkt av Hoyvíkar skúla á fíggjarætlan 2011 | Lækking | -500 |
| 6110 | Innanhýsis umraðfesting fyri røkt av dagstovnum | Lækking | -250 |
| 6110 | (Móttøkuhúsið 50 tús og Mullers Pakkhús 100 tús) | Lækking | -150 |
| 3214 | Børn og ung, Umvælingar o.a. | Lækking | -500 |
| | **Tilsamans** | | **-10.282** |
| **3175** | **Dagstovnurin í Hoyvík** | **Hækking** | **10.282** |

**Býtið millum økir/nevndir**

| | |
|---|---|
| Mentamálanevndin | -1.982 |
| Byggi- og býarskipanarnevndin | -7.000 |
| Fíggjarnevndin | -1.300 |
| | **-10.282** |

**Írestandi fígging**

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Kostnaðarmeting | | -12.000 |
| | Umraðfestingar | | 10.282 |
| | **Írestandi fígging at finna innan umraðfestingar av íløgum** | | **-1.718** |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og miðfyrisitingarstjórin mæla til fígging av kr. 10.282.000 sambært omanfyristandandi ískoyti, og at írestandi fíggingin á kr. 1.718.000 verður funnin innan umraðfestingar av íløgum.

Somuleiðis verður mælt til, at eitt møguligt avlop í mun til kostnaðarmetingina á 12 mió, fellur aftur til tær konti sum verða lækkaðar, við tí býtislutfalli tær luttakað í samlaða kostnaðinum.

**Mentamálanevndin 21. juni 2011:** Samtykt at mæla til at játta kr. 10.282.000 sambært omanfyristandandi yvirliti og at málið um møguliga restfígging verður tikið upp aftur tá annar partur av umvælingini er liðugur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. juni 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 23. juni 2011:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 8. september 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Vísandi til samtykt í mentamálanevndina 21. juni 2011, og í fíggjarnevndini og býráðið 23. juni 2011, tá avgjørt varð at taka spurningin um írestandi fígging upp aftur tá betur yvirlit var yvir støðuna í lon 2 og 3 enn tað var á sumri 2011, tá tað bert var arbeitt í Lon 1, varð við ársenda 2011 gjørd ein dagførd kostnaðarmeting, tá arbeiðið var komið longur áleiðis (dagførd kostnaðarmeting j. nr. 2010-2007/73).

Játtaðar vóru í fyrstu atløgu kr. 10,282 mió.

Sparingar hava alla tíðina verið ein partur av uppgávuni og er eisini blivið spart har tað hevur borið til. Men eitt so umfatandi arbeiði, við so nógvum ókendum faktorum sum henda umvæling hevur havt, ger tað sera trupult at leggja upp fyri øllum hugsandi útreiðslum.

Nú fyriliggur so ein dagførd kostnaðarmeting av sjálvum arbeiðinum sum vísir, at handverkaraútreiðslurnar verða mettar til kr. 11,5 mió u. mvg. Við hesum sum grundarlag hevur umsitingin í samráð við ráðgevan, gjørt eina samlaða kostnaðarmeting, har projektering, eftirlit, prístalsviðgerð, prosjektumsiting og mvg er íroknað, og verður samlaði kostnaðurin mettur til kr. 14,3 mió.

| | | |
| --- | --- | --- |
| handverkara útr | kr. | 11.456.366,00 |
| ráðgeving | kr. | 1.603.612,00 |
| prístalsviðgerð | kr. | 152.765,66 |
| | kr. | 13.212.743,66 |
| prosjektumsiting | kr. | 264.254,87 |
| mvg 6,25% | kr. | 825.796,48 |
| **Kostnaður í alt** | **kr.** | **14.302.795,01** |
| **Áður játtað** | **kr.** | **10.282.000,00** |
| **Írestandi fígging** | **kr.** | **4.020.795,01** |

Umfatandi eykaarbeiði, harav nógv longda byggitíðin, vetrartiltøk o.a. eru viðvirkandi orsøkir til økta kostnaðin.

Longda byggitíðin hevur m.a. viðført nógv øktar útreiðslur til leigu av ymiskari útgerð, eitt nú skúrar, bingjur, hegn, útsúgving og ymiskt annað.

Vetrartiltøkini, fyri at kunna arbeiða uttandura vetrarhálvuna, hava eisini verið umfatandi.

Meirkostnaðurin stavar í høvuðsheitum frá góðkendum meirarbeiði sum til dømis køkar, reingerðing vetrarátøk, umframt at HVS, EL og málaraarbeiði er blivið munandi meira umfatandi.

Arbeiðið líður nú so mikið væl, at spurningurin um írestandi fíggingina tí nú má takast upp aftur av mentamálanevndini, fíggjarnevndini og býráðnum.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Konto 6110, undir Húsaumsitingini, hevur frammanundan goldið kr. 7,0 mió av samlaða kostnaðinum. Við støðið í eini uppgerð fyri konto 6110 fyri roknskaparárið 2011 er komið til ta niðurstøðu, at avlopið er 1,4 mió kr. størri enn upprunaliga mett, og verður tí mælt til at flyta hesa upphædd til dagstovnin í Hoyvík, konto 3175 proj. nr. L31003.

Eftir at fíggja verða sostatt kr. 2,6 mió. Skotið verður upp, at hetta verður fíggjað við rakstraravlopum á niðanfyri standandi kontum fyri 2011:

| | | |
|---|---|---|
| 1313 | Tekniska fyrisiting | 600.000 |
| 5510 | Tórshavnar býarsavn | 183.000 |
| 2211 | Heilsufrøðiskipan | 100.000 |
| 2102 | Sjúkrakassaeftirstøður | 150.000 |
| 3101 | Dagrøktin | 700.000 |
| 3213 | Systkinaavsláttur rakstur | 338.000 |
| 4144 | Skúlabarnaflutningur | 450.000 |
| 1315 | Nevndir og ráð | 100.000 |

Saman við teimum 1,4 mió kr. frá Húsaumsitingini, gevur hetta 4.021.000 kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og miðfyristingarstjórin mæla til fígging av 4.021.000 kr. sambært omanfyri standandi ískoyti, og at henda upphædd verður játtað sum eykajáttan til 3175 L31003 Dagstovnurin í Hoyvík av omanfyri nevndu rakstrakontum í alt 4.021.000.

Somuleiðis verður mælt til, at eitt møguligt avlop í mun til kostnaðarmetingina á 12 mió kr. fellur aftur til tær kontur, sum verða lækkaðar, við tí býtislutfalli tær luttaka í samlaða kostnaðinum.

**Mentamálanevndin 11. januar 2012:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Elin Lindenskov og Rúni Djurhuus samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti: Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen taka støðu á einum seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2012:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Elin Lindenskov, mælir býráðnum til at taka undir við meirilutanum í mentamálanevndini.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Bogi Andreasen, tekur støðu á seinni fundi.

Ein samd nevnd heitir á kommunustjoran um at útvega nevndini eina gjølliga frágreiðing um samlaðu gongdina í umvælingarmálinum.

**Býráðið 26. januar 2012:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Rúni Djurhuus.

Greiddu ikki atkvøðu: Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Inga Dahl, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

**15/12** **<u>2005-1183</u>**

**<u>Reinsaríið í Tórsgøtu</u>**

**Samandráttur:**
Vísandi til undanfarna samtykt í málinum, har játtaðar eru kr. 450.000 til kanningar og ráðgeving at bjóða arbeiðið út í høvuðsentreprisu, hevur arbeiðið higartil leitt fram til, at mælt verður til at broyta leist fyri hetta arbeiðið.

Orsøkin er, at kanningarnar av bygninginum hava víst, at umvælingararbeiðið í stóran mun best kann skipast sum smáar einkult standandi arbeiðstøkur, sum noyðast at fremjast í stigum fyri at kunna taka støðu til, hvussu farast skal víðari fram. Hetta er serstakliga grundað á, at talan er um ein gamlan bygning, sum fyrst hevur havt nógva og skiftandi nýtslu, og síðan hevur staðið tómur. Hetta hevur havt sína ávirkan á týðandi bygningslutir, og neyðugt er sostatt at bróta niður partar fyri at fáa eina hylling á, hvussu farast skal víðari fram.

Tá talan er um slíkt arbeiði, sum nærum kann samanberast við restaureringsarbeiði, verður ofta mett, at tað er sera óheppið at binda seg til eina høvuðsentreprisu í sáttmála. Vandi er fyri at koma í ta støðu, at eitt av arbeiðinum avdúkar so týðandi trupulleikar, at neyðugt kann verða við munandi fleiri pengum fyri at fremja lidnu loysnina eftir avtaluni, sum er sáttmálabundin. Og tá hevur byggiharrin ringar møguleikar at annaðhvørt steðga á ella skifta loysn uttan stórar eykakostnaðir.

Skotið verður tí upp at brúka annan leist, at samlaða íløgujáttanin, ið eftir er kr. 1.050.000, verður játtað til verkætlanina, og at bjóða arbeiðið út í smærri arbeiðstøkur sum undirhondsboð, so hvørt sum ein arbeiðstøka er avklárað.

Kostnaðarmeting fyri fyrsta umbyggingarstig verður løgd fram á fundinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 1.050.000 av kontu 5376, L53002 Reinsaríið stigvis umbygging, og at einstøku arbeiðstøkurnar verður bodnar út sum undirhondsboð.

**Mentamálanevndin 9. november 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. november 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 24. november 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á fundi við Tórshavnar kommunu 16. november 2011 vísti Felagið MenTón á vantandi tónleikaumstøður í Havn, og ynski varð sett fram um, at Reinsaríið í Tórsgøtu verður spælistað. Teirra meting er, at tann núverandi ætlanin ikki er nøktandi til teirra virksemi. Í hesum sambandi er neyðugt at kanna, um til ber at laga verkætlanina til tørvin hjá tónleikarunum, herundir ljóðviðurskifti.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 75.000 av kontu 5366 Stuðul annars til at kanna, hvussu bygningurin best verður lagaður til tørvin hjá tónleikinum.

**Mentamálanevndin 30. november 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Mikael Viderø, býararkitektur, varð biðin um at kanna um Reinsaríið eisini kann brúkast til rytmiskt spælistað.

Kontrast Arkitektar hevur gjørt nýtt uppskot av Reinsarínum.

Í nýggja uppskotinum, januar 2012, verður m.a. sagt:

“ Reinsaríið verður í dag eina mest nýtt til konsertir. Uppruna uppskotið var, at húsið skuldi nýtast til fleiri ymisk endamál, til tónleikaframførslur, almen tiltøk, bókakafe, uppihaldsstað fyri ungdómar á útferð, herundir dag- og frítíðarstovnar. Tað hevur verið eitt ynski, at broyta ætlanina, soleiðis at møguleiki er at brúka húsið til rytmiskt spælistað. Tískil eru ávísar broytingar gjørdar í mun til fyrra uppskotið. Meira luft er nú millum hæddirnar fyri at økja um rúmd (volumen). Men annars er tankin tann sami, við einum gjøgnumgangandi multifunktionaliteti.

Byggilistarliga hugskotið byggir uppá, at samantvinna tað gamla við nakað nýtt. Innan verður tað gamla varðveitt, sum er merkisvert í sær sjálvum, og við nýggjari innrætting og nútíðar sniði fæst ein meira tíðarhóskandi og nýtiligur bygningur. Hugskotið byggir eisini uppá at fáa ein polyvalentan bygning, sum við sínum mongu tiltøkum kann broyta funktión eftir tørvi. Hetta, at hava rúmini so opin sum møguligt og funktiónirnar mobilar. Rýmingartrappa í norðurskjøldrinum er eisini hugsað sum brúkstrappa.

Veghæddin skal kunna nýtast til rytmiskan tónleik, men eisini er møguleiki fyri øðrum framførslum. Pallurin verður í vestursíðuni á fyrstu hædd, við sitiplássum kring pallin, samstundis sum sitipláss verða kring opið á aðru hædd.”

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at arbeiða víðari eftir uppskotinum frá januar 2012, til eisini at gera Reinsaríið til eitt rytmiskt spælistað og samstundis varðveita multifunktionalitetin.

Á íløguætlanini 2012 konto 5375 eru avsettar 1 mió. kr.

Mælt verður til at játta 1 mió. kr. av íløgum 2012 til at arbeiða víðari í sambandi við liðugtgerð av Reinsarínum.

**Mentamálanevndin 11. januar 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina partin um peningajáttina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Figgjarnevndin 18. januar 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 1 mió. av íløguætlanini 2012 konto 5375 til at arbeiða víðari í sambandi við liðugtgerð av Reinsarínum.

**Býráðið 26. januar 2012:** Einmælt samtykt

**16/12** **<u>2009-1391</u>**

**<u>Útbygging av Hoyvíkshøllini</u>**

**Lýsing og samandráttur av málinum:**
Hoyvíkshøllin varð tikin í nýtslu í 2002. Neyðugt er við dagføring av høllini m.a. tí hølisviðurskiftini ikki eru nøktandi. Talan er m.a. um umklæðingarrúm, wc og gongd, sum eru ov smá. Eisini er tørvur á einum duri, soleiðis at fólk ikki koma beint inn í høllina uttanífrá. Í sambandi við nevndu dagføring skal gerast ein lýsing av tørvinum og kostnaðarmeting.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 100.000 kr. av játtaðum íløgum á trivnaðarøkinum ætlaðar Høllini á Hálsi, til at lýsa tørvin á at dagføra Hoyvíkshøllina og gera kostnaðarmeting.

**Mentamálanevndin 27. mai 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta kr. 100.000 til at lýsa tørvin á at dagføra høllina og gera kostnaðarmeting.

**Fíggjarnevndin 28. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 100.000 av játtaðum íløgum á trivnaðarøkinum ætlaðar Høllini á Hálsi.

**Býráðið 28. mai 2009:** Atkvøtt var um tilmæli hjá fíggjarnevndini, sum var samtykt við 9 atkvøðum fyri og 0 ímóti. Fyri atkvøddu Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin K. Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup S. Simonsen, Sjúrður Johannesen, Annfinn Brekkstein, Inga Dahl. Ingrid Henriksen og Jan Christiansen greiddu ikki atkvøðu.

**Uppískoyti:**
Skotið verður upp at byggingin verður skipað á tann hátt, at 260 $m^2$ verða bygdir í tveimum hæddum, tilsamans 520$m^2$, har bert veghæddin verður innrættað endaligt. Á veghædd verður høvuðsinngongd og forhøll, 4 áskoðaravesir, goymslur og tvey umklæðingarrúm við brúsum. Hetta loysir í fyrstu atløgu bráðfangis tørvin.

Í kostnaðarmetingini er roknað við, at restin av bygninginum ikki er innrættaður, hvørki við innveggjum, hurðum, el- og ljósbúnaði, hita-og sanitetsbúnaði endaligum lofti, gólvbúnaði, málaraarbeiði og trappu. Tað er fyrireikað fyri lyft, men lyftin er ikki við í kostnaðinum.

Kostnaðurin er 4.488.000 kr íroknað ókent, ráðgeving og mvg.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 4,5 mió. kr. av avlopinum av áður játtaðari upphædd til Høllina á Hálsi (journal-nr. 1999-0345). Tøkar eru íalt 8,9 mió. kr.

**Mentamálanevndin 11. november 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndina.

**Býráðið fyri læstum hurðum 26. november 2009:** Málið varð umrøtt.

**Býráðið 26. november 2009:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini 18. november 2009.

- Tilmæli kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 24. mars 2010:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Jógvan Arge ynskir málið á skrá.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Trivnaðarstjórin greiddi frá málinum.

**Mentamálanevndin 28. apríl 2010:** Kunnað varð um málið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at bjóða arbeiðið út í innbodnari høvuðsentreprisu.

**Mentamálanevndin 17. mai 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2010:** Samtykt at mæla býráðnum at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 20. mai 2010:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Mentamálanevndin 1. september 2010:** Kunnað varð um málið.

**Mentamálanevndin 3. november 2010:** Samtykt at heita á umsitingina um at fáa málið frá hondini.

**Mentamálanevndin 12. januar 2011:** Tekniski stjórin kunnaði um málið.

**Ískoyti:**

MAP Arkitektar hava gjørt skitsur av innrætting í mars 2010, og upprit v. kostnaðarmeting 17. februar 2010, áljóðandi kr. 4.587.245. Kostnaðarmeting har prosjektumsiting, ókent, prístalsregulering v.m. er lagt afturat meting ráðgevans, er av umsitingini mett til kr. 5.100.000. Tøkur peningur á játtanini er pr. 9. februar 2011 kr. 4.541.409. Írestandi kapitaltørvurin er á fyriliggjandi grundarlagi sostatt mettur til kr. 558.591.

Verkætlanin fevnir bert um liðugtgerð innan av pørtum av útbyggingini, sambært uppritinum hjá ráðgevanum.

Býráðið hevur 26. november 2009 samtykt at játta kr. 4,5 mió til verkætlanina, og 20. mai 2010 er samtykt at lata arbeiðið bjóða út í innbodnari høvuðsentreprisu.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at:

- at góðkenna skitsuuppskotið hjá ráðgevanum
- at góðkenna uppskotið til sáttmála við ráðgevan
- at útvega metta írestandi kapitaltørvin á kr. 558.591 av íløgukontu 5775 L00001, løgujáttan,

og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 9. februar 2011:** Jákup Eghom Hansen, tekniskur stjóri, greiddi frá. Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2011:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og mæla býráðnum til at játta kr. 559.000 av framfluttum íløgukarmi fyri 2010.

**Býráðið 24. februar 2011:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 30. august 2011:** Málið umrøtt.

**Fíggjarnevndin 31. august 2011:** Málið umrøtt.

**Ískoyti:**
Tann 27. juni 2011 var lisitatión uppá útbygging av Hoyvíkshøllini. 4 tilboð komu inn. Úrslitið frá lisitatiónini tann var:

1. J & K Petersen kr. 4.733.029,33 u/ mvg
2. ÁTS kr. 5.182.139,75 u/ mvg
3. Búsetur kr. 6.010.299,24 u/ mvg
4. Articon kr. 6.291.903,00 u/ mvg

Metingin í byggiskránni nov. 2009 er kr. 4.224.000,- u/ mvg.

Lisitatiónsúrslitið kann tulkast sum ein staðfesting av, at áður gjørda kostnaðarmetingin, sum hevur ligið til grund fyri politisku viðgerðini, hevur verið so tíðliga í verkætlanini og á einum so mikið leysum grundarlag, at neyvleikin á henni er at rokna sum vegleiðandi.

Ráðgevin hevur kannað, um møguligt er at spara í tilboðsupphæddini og metir, at tað ikki er ráðiligt, tí hetta kemur at ganga út yvir umklæðingarrúmini, sum ikki verða tøk, um sparing verður gjørd. Tær sparingar, sum kundu komið uppá tal, eru longu gjørdar í byggiskránni og í projekteringini.

Kannað er eisini, hvar munurin millum byggiskrá og tilboð stavar frá. Í byggiskránni er ikki roknað við, at bygningurin kemur so langt niður á parkeringsøkið, sum tær neyvu uppmátingarnar í projektinum hava staðfest.

Tað er serliga hetta, sum ger seg galdandi, har "grundin" verður hægri, sum er frávikið millum tilboð og byggiskrá.

Umsitingin hevur tí eisini kannað møguleikan fyri at gagnnýta hæddarmunin á økinum til kjallara, so at hølir, sum stórur tørvur er á í hesi høllini, kunna gerast undir útbyggingini, ístaðin fyri at fylla upp.

Tilboð uppá hetta arbeiðið er heintað inn frá lægstbjóðandi uppá upprunaútbjóðingina.

Við støði í frágreiðing frá MAP Arkitektar, sum er ráðgevi á verkætlanini um útbygging av Hoyvíkshøllini, hevur tekniska fyrisitingin gjørt kostnaðarmeting av, hvat verkætlanin, íroknað allar útreiðslur, kann væntast at koma at kosta. Íroknað hesa kostnaðarmeting er eisini umlegging av fjarhitarørum sum koma at liggja undir byggingini, og sum Fjarhitafelagið krevur flutt.

<u>Fíggjarlig viðurskifti:</u>
Býráðið hevur áður játtað kr. 5.100.000,- tilsamans til verkætlanina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á mentamáladeildini mæla til at taka av tilboðnum hjá J & K Petersen um upprunaliga tilboðið á kr. 4.733.029,33 u/ mvg og av ískoytistilboðnum á kr. 263.040,- at byggja fulla óinnrættaða veghædd undir umklæðingarrúmunum, og gera sáttmála við J & K Petersen um tilsamans kr. 4.996.069,33.

**Mentamálanevndin 8. september 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 8. september 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og at taka av tilboðnum uppá kr. 4.996.069,33 frá J & K Petersen.

**Býráðið 8. september 2011:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 29. september 2011:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Í sambandi við byggimálið er komið fram, at neyðugt er at grava munandi longri niður fyri at koma niður á fast. Staðfest er, at neyðugt verður at grava eitt lag av mógvi burtur undan tilbygninginum, umleið 2,5 m., og fylla grótfyllu í aftur. Sambært upplýsingum frá Mikael Viderø, býararkitekti, verður kostnaðurin av hesum arbeiði umleið kr. 375.000.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta írestandi peningin kr. 375.000,00 av íløgum 2012, konto 5775 vøllurin í Hoyvík.

**Mentamálanevndin 11. januar 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Figgjarnevndin 18. januar 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 375.000,00 av íløgum 2012, konto 5775 vøllurin í Hoyvík.

**Býráðið 26. januar 2012:** Einmælt samtykt.

**17/12** **<u>2012-0026 RFP</u>**

**<u>Kloakkútlop við Rættargøtu á Argjum</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Av tí at kloakkin, sum rennur frá reinsiverkinum við Rættargøtu á Argjum, og leiðingin frá Norðasta Horni, liggur rættiliga tætt við Sandagerð, sum er eitt stað ið nógv verður nýtt sum frítíðarstað og sum grindavág, verður neyðugt at leingja kloakklopið út á fjørðin uml. 50 m.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Biðið verður um kr. 200.000 av játtanini fyri íløgur í 2012 til projektering og útbjóðing, at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión. Víst verður annars til skjal 2012-0026/1.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin á plan- og rakstrardeildin mæla til at játta kr. 200.000,- av íløgum fyri kloakkarbeiði í 2012 til projektering og útbjóðing at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 12. januar 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, at leggja fyri býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 200.000,- av íløgum fyri kloakkarbeiði í 2012 til projektering og útbjóðing.

**Býráðið 26. januar 2012:** Einmælt samtykt.

**18/12** **2012-0027 RFP**

**Kloakkútlop í bátahavnina á Argjum**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í sambandi við løggilding av kloakkini í Tórshavnar kommunu verður neyðugt at flyta kloakkina, sum nú rennur í bátahavnina, út um grótkastið, so hylurin verður reinur fyri kloakkvatn.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Biðið verður um kr. 300.000 av játtanini fyri íløgur 2012 til projektering og uppmáting, at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión Víst verður annars til skjal 2012-0027/1.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin á plan- og rakstrardeildin mæla til at játta kr. 300.000,- av íløgum fyri kloakkarbeiði í 2012 til projektering og útbjóðing at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 12. januar 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, at leggja fyri býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 300.000,- av íløgum fyri kloakkarbeiði í 2012 til projektering og útbjóðing.

**Býráðið 26. januar 2012:** Einmælt samtykt.

**19/12** **2012-0028 RFP**

**Kloakk fram við Hoydalsá – Óluvugøtu – Svartafoss**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í sambandi við reinsan av Hoydalsá manglar nú kloakkin frá Óluvugøtu-Svartafossi at verða gjørd, fyri at áin á hesum staðnum verður rein.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Biðið verður um kr. 200.000 til projektering og kanningararbeiði, at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión Víst verður annars til skjal 2012-0028/1.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin á plan- og rakstrardeildin mæla til at játta kr. 200.000,- av íløgum fyri kloakkarbeiði í 2012 til projektering og útbjóðing at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 12. januar 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, at leggja fyri býráðið, um fíggjarnevndina.

**Figgjarnevndin 18. januar 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 200.000,- av íløgum fyri kloakkarbeiði í 2012 til projektering og útbjóðing.

**Býráðið 26. januar 2012:** Einmælt samtykt.

**20/12** **2011-0604**

**Viðvíkjandi útstykking á Lygnnesi í Kollafirði**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Umsitingin hevur arbeitt við at útstykkja kommunalu ognina, matr. nr. 203c í Kollafirði. Fyri at fáa eina so góða útstykking sum til ber, er uppskot til útstykkingarætlan gjørd í samráð við grannar til kommunalu ognina, matr. nr. 209, 308 og 309 í Kollafirði.
Ætlanin er at útstykkja soleiðis, at tað verða 10 grundstykkir til sethús sum eru uml. 500 m² til víddar. 4 grundstykkir liggja inni á kommunalum øki, 3 á privatum øki, og 3 liggja bæði á kommunalum og privatum øki.
Neyðugt verður at gera ein 8 m breiðan veg, sum verður 74 m langur við einari gongubreyt frá núverandi vegi á Lygnnesi.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Økið liggur í umráðisparti A1 í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Matr. nr. 203c er 6.563 m² til víddar.Eigari:Tórshavnar kommuna
Matr. nr. 209 er 975 m² til víddar. Eigari: Dania Dam
Matr. nr. 308 er 1.548 m² til víddar. Eigari: Jógvan Dam
Matr. nr. 309 er 1.840 m² til víddar. Eigari: Jens Andreas Dam.

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1.

**Fíggjarligt:**
Kommunan hevur biðið Una Patursson, verkfrøðing um eina kostnaðarmeting av vegnum og er upphæddin uml. 2 mió. kr. Tá er projektering, eftirlit og byggileiðsla við, men ikki mvg.
Kommunan má leggja út fyri arbeiðini, ið verður afturgoldið tá stykkini eru seld.

**Viðmerkingar frá Teknisku deild:**

**Skjøl:**
2011-0604

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at umsitingin, í samráð við grannarnar ger serstaka byggisamtykt fyri økið, at leggja fyri nevndina aftur og at beina málið í fíggjarnevndina við atliti til fígging av ávegis kostnaðinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. apríl 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Kommunan hevur í samráð við eigarnar gjørt uppskot um serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 203c, 209, 308 og 309. Ætlanin er at útstykkja soleiðis, at tað verða 10 grundstykkir til sethús sum eru uml. 500 m² til víddar. 4 grundstykkir liggja inni á kommunalum øki, 3 á privatum øki, og 3 liggja bæði á kommunalum og privatum øki.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 203c, 209, 308 og 309 á Lygnnesi í Kollafirði.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 2. mai 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 26. mai 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**

Samráðingar hava verið við ánarnar av grannaognunum til útstykkingina, ið undir ávísum treytum eru sinnaðir at vera við í útstykkingini.

Í sambandi við útstykkingina, lata privatu ánararnir nakað av øki og nakað verður makaskift.

Verandi ánarar av grannaognunum koma at eiga 3 av teim niðastu 10 stykkjunum sum privat ogn. Hesir skulu, í sambandi við útstykkingina, rinda teirra part sambært vanligu reglunum. Viðvíkjandi luttøku í vegagerðini, so skulu verandi privatu ánarar rinda teirra part tá teir skulu brúka vegin, t.d. tá teir søkja um byggiloyvi ella ætla at byggja, tó í seinasta lagi 10 ár eftir at útstykkingin er framd.

**Tilmæli**
Miðfyrisitingarstjórin og leiðarin av starvsfólka- og løgdeildini mæla til at gera avtalu við ánararnar um útstykkingina sambært omanfyristandandi leisti og at játtað upp til 2,7 mió. kr. fyri at fremja útstykkingina fíggja av konto 6175 keyp og sølu av fastari ogn.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og at játta upp til 2,7 mió. kr. fyri at fremja útstykkingina, at fíggja av konto 6175 keyp og sølu av fastari ogn.

**Býráðið 26. januar 2012:** Einmælt samtykt.

**21/12** **<u>2009-1489</u>**

**<u>Boðanesheimið - alternativ orkuskipan</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært byggiskránni fyri Boðanesheimið er dentur lagdur á at byggja ein sokallaðan lág-orku bygning smbr. orkuklassa 2 í BR-08, svarandi til eina árliga brutto orkunýtslu á 70 kWh fyri hvønn fermetur. Hettar merkir, at herd krøv eru til bæði tættleika og bjálving, umframt at “orkuramman” fyri bygningin skal prógvast í høvuðsprojektinum eftir nærri ásettum reglum.

Afturat hesum leggur byggiskráin upp til alternativa orkuútvinning smbr. pkt. 6.4.4:
“Grøn orkuveiting:
Umframt tilboði við oljufýrdum hitaverki, skal alternativt tilboð gevast við jarðhitapumpu at nøkta samlaða orkutørvin til upphiting og ventilering av bygningi, og upphiting av brúksvatni. Staðseting og tal av holum skal gerast í samráð við Jarðfeingið.

Uppskotið til grøna orkuveiting verður lýst við frágreiðing, principtekning og útrokning av COP-virði, árligari orkusparing og afturgjaldstíð av meirkostnaði."

Í vinnandi tilboðnum frá ArtiCon var alternativt roknað við at borað 25 hol niður á 200 m í økinum kring bygningin og knýta hesi í 4 hitapumpur. Fjarstøðan millum hesi hol er 40 m, svarandi til ein økistørv á uml. 30.000 fermetrar. Meiríløgan er um 1,7 mió.kr., árliga orkusparingin 16 kWh fyri fermeturin og afturgjaldstíðin um 15 ár við grundarlagi í verandi kostnaðarstøði.
Bygningurin er annars sera væl bjálvaður og í høvuðsheitum upphitaður við gólvhita í eini lágtemperatur-skipan (~55o), og sostatt sera væl egnaður til eina hitapumpuloysn.

Undir sáttmálasamráðingunum við ArtiCon í nov-des 2010 gjørdist greitt, at neyðugt var at leingja byggitíðina 2 til 3 mánaðir um jarðhitaskipan var vald, orsakað av nógvu holunum, ið skuldu borast í økinum kring bygningin. Kravið um tíðarleingjan, saman við óvissum um m.a. trygd fyri hita-veitingini, tá ongar royndir eru við jarðhita-skipan av slíkari stødd í Føroyum, førdi til, at avgerð varð tikin um at bíða við alternativari orku fyribils.

Síðan byggingin byrjaði hevur bygginevnd og umsiting, saman við arbeiðstakaranum kannað møguleikan fyri burðadyggari loysn í sambandi við eina hitapumpu-skipan, ið ikki nervar verandi bygging. Komið er fram til, at møguleikar eru eystanfyri vegin Yviri við Strond. Vansin er tó, at økið millum sjóvarmálan og vegin er fríøki/friðað øki, ið krevur serstakt loyvið við serstøkum atlitum í samband við inntriv í lendi. Eisini er økið beint yvirav Boðanesheiminum privat ogn, og verður tískil neyðugt at nýta økið sunnanfyri, sum í løtuni verður nýtt til tjaldingarpláss.

Í sambandi við at farið verður yvir um vegin, hevur ein nýggjur møguleiki stungið seg upp, nevniliga at nýta sjóvarhita heldur enn jarðhita. Møguleikin er einastandandi, tí staðsetingin av bygninginum er so lágt og tætt at sjóvarmálanum. Fyrimunirnir við sjóvarhita fram um jarðhita eru, at økistørvurin er sera lítil, bert eitt lítið pumpuhús niðri við sjóvarmálan, og at tað slepst undan at órógva annað øki. Vansin er, at bert ein roynd higartil er gjørd í Føroyum við sjóvarhita, og ongar langtíðarroyndir eru. Tó skal viðmerkjast, at henda eina royndin, eftir ávísar tillagingar, vísur seg at verða sera væleydnað, og teknikkurin aftanfyri skipanina er sera líkur vanliga jarðhita-skipanini og sostatt ikki ókendur.

Bygginevndin hevur tikið avgerð um, at bygningurin ið best møguligan mun verður fyrireikaður til hitapumpuskipan, jarð- ella sjóvarhita, soleiðis, at leiðingar verða lagdar úr fýrrúmi oman til vegin, og pláss er tøkt í kjallara til hitapumpur, vatngoymslutangar o.a., sum krevst í hesum sambandi. Hesar fyrireikingar kosta undir kr. 20.000 at fremja nú og viðføra, at tað seinni slepst undan av grava økið upp inn undir bygningin og gera størri broytingar inni fyri munandi størri kostnað.

Hinvegin metir bygginevndin ikki tað verða hennara avgerð at taka støðu til, um stig skal takast til fult og heilt at fara frá ætlaða oljufýrda hitaverkinum og yvir til eina hitapumpuskipan nú, og saknar einfalt eina politiska støðutakan til spurningin um "grøna orku" sum heild at styðjað seg til.

Verður avgerð tikin um at nýta hitapumpuskipan nú, so kunnu ketlar, oljutangi og skorsteinur fyri uml. kr. 2-300.000,- sparast burtur, tó verður neyðugt við einari eykajáttan á fyribils uml. 1,7 mió.kr. fyri sjálva hitapumpuskipanina, íroknað boran av holum ella pumpuhús.

**Sosiala nevnd 3. mai 2011:** Sosiala nevnd samtykti at mæla býráðnum um fíggjarnevndina, at taka avgerð um burturav at nýta sjóvarhita sum orkuskipan til heimið og at fáa neyðuga fígging til vega.

**Fíggjarnevndin 4. mai 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd og avgreiða spurningin um fígging, tá ið kanningararbeiðið er avgreitt.

**Býráðið 26. mai 2011:** Einmælt samtykt og at fíggja meirkostnaðin innanfyri verandi karmar

**Nýtt:**
Forkanningarnar eru nú komnar undir land, og vísur tað seg, at samlaði kostnaðurin verður kr. 4,8 mió. kr., sum er 3,1 mió. kr. meir enn upprunaliga kostnaðarmetingin á 1,7 mió. kr.

Orsøkirnar til meirkostnaðin eru als ikki nøktandi lagdar fram fyri umsitingini, men millum annað er talan um eitt væl størri anlegg, ið framleiðir 240 KW ímóti 125-160 KW, sum upprunaliga upplýst.

Ivasamt er um meiríløgan nakrantíð verður vunnin inn aftur. Tó valdast sjálvandi hvussu oljuprísurin verður í framtíðini.

Sum støðan er nú, so eru tvinnir kostir í at velja:

1: Venda aftur til oljufýrdar ketlar, sum í upprunaliga projektinum. Hetta viðførur smbr. útgreiningum hjá ArtiCon ein meirkostnað á kr. 695.000 fyri forkanningar av grønari orku, umframt ávísa umprojektering. Nevnast skal tó, at møguleiki er seinni at venda aftur til t.d. sjóvarhita.

2: Halda fast við tilmæli frá 3. mai 2011 um at nýta sjóvarhita burturav og fáa neyðuga fígging til vega. Verandi íløgujáttan til Boðanesheimið ber ikki eina tílíka meirútreiðslu.

**Sosiala nevnd 6. desember 2011:** Nevndin átalar, at so stórur munur er á uppruna kostnaðarmetingini, sum støða er tikin út frá, og endaliga tilboðnum.

Ein meirluti, Levi Mørk, Vagnur Johannesen og Sjúrður Olsen, vísir til, at tilboðið frá ArtiCon er 3,1 mió. kr. dýrari, og mælt verður tí til at venda aftur til uppruna projektið við oljufýrdum ketlum, men at møguligt skal verða at venda aftur til sjóvarhita seinni.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal og Halla Samuelsen, mæla til at halda fast við tilmæli frá 3. mai 2011 um at nýta sjóvarhita burturav og kanna tilboðið nærri, herundir kost-nyttukanning vísandi til týdningin av, at allir kommunalir bygningar verða upphitaðir við varandi orku.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2011:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Sjúrður Olsen og Bogi Andreasen mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í sosialu nevnd og venda aftur til uppruna projektið við oljufýrdum ketlum og at møguligt verður at binda í eina skipan við sjóvarhita seinni.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, mælir til at halda fast við tilmæli frá 3. mai 2011 um at nýta sjóvarhita burturav og kanna tilboðið nærri, herundir kost-nyttukanning vísandi til týdningin av, at allir kommunalir bygningar verða upphitaðir við varandi orku.

**Býráðið 14. desember 2011:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmæli frá borgarstjóranum, um at arbeiða víðari við sjóhitaskipan og beina málið í fíggjarnevndina at finna fígging.

**Ískoyti:**
Articon hevur í skrivi dagfest 14. desember 2011 boðað kommununi frá, at kostnaðurin fyri lidna anleggið verður kr. 4.800.000 u/mvg, men íroknað allar veitingar og tær óvissur, sum Articon hevur víst á í frágreiðing og tilboði.

Býráðið samtykti 26. mai 2011, at meirkostnaðurin, sum tá varð mettur til kr. 1,7 mió, skuldi fíggjast av verandi íløgukarmi til verkætlaninia. Fíggjartørvurin, sum verður at leggja aftrat samlaðu íløgujáttanini til verkætlanina, er tí kr. 3,1 mió umframt mvg.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, trivnaðarstjórin og miðfyrisitingarstjórin mæla til at fíggja meiríløguna soleiðis:

Fylgjandi íløgujáttanir (frá 2011 og eldri) verða lækkaðar við nevndu upphæddum.

| Deild | Økið | Løgunr | Heiti | Kr. tús. |
|---|---|---|---|---|
| 2775 | Eldrarøkt | L00001 | Løgukarmur fyri árið | 750 |
| 4175 | Dagføring av skúlum | L00001 | Løgukarmur fyri árið | 500 |
| 6275 | Fríðkan av býnum | L62007 | Bygningur til lendisdeildina | 500 |
| 6575 | Kirkjugarðar | L00001 | Løgukarmur fyri árið | 500 |
| 7175 | Renovasjón | L71001 | Tyrvingarplássið á Glyvursnesi | 500 |
| 7476 | Smábátahavnir | L00001 | Løgukarmur fyri árið | 500 |
| | **Tilsamans** | | | **3.250** |

Upphæddin á 3.250.0000 kr verður flutt til deild 2775 Eldrarøkt (íløgur) L27002 Boðanesheimið.

**Fíggjarnevndin 10. januar 2012:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Elin Lindenskov taka undir við tilmælinum og mæla býráðnum til at taka av tilboðnum hjá Articon á 4,8 mió kr., ið verður at fíggja samsvarandi omanfyri standandi yvirliti og at heimila umsitingini at gera ískoytissátmála við Articon um arbeiðið.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Bogi Andreasen, taka ikki undir við tilmælinum vísandi til, at sjóvarhitaorkan ikki er lønandi fyri kommununa, og at kommunan onga trygd hevur fyri íløguni á 4,8 mió. kr.

**Ískoyti:**
Vísandi til málsetningar býráðsins at arbeiða fyri burðardyggum og umhvørvisvinarligum loysnum, hevur býráðið 14. desember 2011 tikið avgerð um at arbeiða víðari við sjóvarhitaskipan til Boðanesheimið. Talan er um eina nýggja slóðbrótandi loysn, ið ætlandi skal gerast ein varði innan grønar orkuloysnir, og tí mælir samgongan býráðnum til at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini og taka av tilboðnum hjá Articon á 4,8 mió kr., ið verður at fíggja samsvarandi omanfyri standandi yvirliti og at heimila umsitingini at gera ískoytissáttmála við Articon um arbeiðið.

**Býráðið 10. januar 2012:** Fyrst varð atkvøtt um meirilutatilmælið frá Heðini Mortensen, Jógvani Arge og Elini Lindenskov í fíggjarnevndini 10. januar 2012, ið var samtykt við 8 atkvøðum fyri og 0 ímøti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Halla Samuelsen, Marin Katrina Frýdal, Levi Mørk, Jákup Símun Simonsen og Rúni Djurhuus.

Greiddu ikki atkvøðu: Sjúrður Olsen, Jan Christiansen, Annfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen og Bogi Andreasen.

**Býráðið 26. januar 2012:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Rúni Djurhuus.

Greiddu ikki atkvøðu: Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Inga Dahl, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

22/12 **2008-0191**

**Íbindingargjald**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Stjórarnir hava umrøtt "politikkin" viðvíkjandi rokniháttinum fyri íbindingargjøldum og biðja um endurskoðan av hesum fyri betur at kunna javnstilla fólk og virkir.

Umsitingin greiðir frá um málið.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2008:** Samtykt at seta í gildi nýggjan útrokningarhátt fyri íbindingargjald og vatngjald galdandi fyri alla bygging. Verandi kloakkgjald á kr. 10,00 pr. $m^2$ av grundøki fellur burtur. Víst verður til skjal 2008-0191/2.

**Býráðið 31. januar 2008:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið var samtykt við 7 atkvøðum fyri og 5 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov.

Ímóti atkvøddu: Inga Dahl, Beate L. Samuelsen, Høgni Mikkelsen, Jan Christiansen, og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at skipanin nú hevur virkað í eina tíð, verður málið lagt fyri til umrøðu og møguliga tillaging.

Nýggi útrokningarháttturin fyri íbindingargjøld, sum er galdandi fyri alla bygging í kommununi ásetur eitt gjald eftir nøkrum sokallaðum persónsekvivalentum (PE-

eindir), alt eftir hvat slag av virksemi talan er um, og brúkar síðani fermetrarnar av tí sum bygt verður at rokna út eftir.

Dømi um gjøld:
- Sethús á 100 m² eitt plan kr. 23.750
- Sethús á 100 m² við kjallara: kr. 39.900
- Sethús á 100 m² við kjallara og loft kr. 49.875

Talan er um eitt íbindingargjald, sum skal dekka part av útsreiðslunum fyri kommunalar veitingar fram til økið og fyri tær avleiðingar sum útstykkingin og byggingin annars hevur við sær.

Vísandi til omanfyri nevnda, so kundi ein loysn verið at býtt gjaldið í 2 partar, soleiðis at ein partur verður goldin tá útstykkingarloyvi verður givið og ein partur tá byggiloyvi verður givið.

Møgulig uppskot verða løgd fram á fundinum.

Elin Lindenskov var ikki við til hetta mál.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. august 2011:** Nevndin samtykti, at umsitingin ger eitt nýtt uppskot at leggja fyri nevndina aftur.

**Nýtt uppskot:**
Vísandi til nevndarviðgerðina hin 22. aug. 2011, har avgjørt varð at endurskoða skipanina fyri íbindingargjøld soleiðis, at kommunan fær endurgoldið ein part longu tá kommunan hevur sínar útreiðslur til veitingar– tvs. tá ein útstykking fer í gongd, hevur umsitingin arbeitt við einum broytingaruppskoti.

Íbindingargjaldið verður tað sama sum nú, men tann broytingin verður gjørd, at helvtin av gjaldinum verður goldið tá útstykkingarloyvið verður útskrivað og hin helvtin tá ið byggiloyvið verður útskrivað.

<u>Tá ið byggiloyvi verður givið:</u>
Reguleringsfaktorurin verður settur til 0,5 (hinar 0,5 til útstykkingarloyvið), annars verður skjalið tað sama.
Upplýst verður á rokningini um bygningsslag, PE-faktor, regulering, fermetrar og kostnaður íalt.

Dømi um gjøld eftir nýggja uppskotinum:
- Sethús á 100 m² ein hædd kr. 11.875
- Sethús á 100 m² við kjallara: kr. 19.950
- Sethús á 100 m² við kjallara og loft kr. 24.938

<u>Skiftisreglur fyri gjald í samband við byggiloyvi:</u>
Skeringsdato fyri broytingini verður dagfestingin av góðkenningini av byggiloyvinum. Tó so, at tey sum hava goldið fult gjald eftir verandi skipan, fáa

tað aftur sum tey hava goldið ov nógv, soleiðis at teirra gjald verður tað sama sum eftir nýggja uppskotinum.

Tá ið útstykkingarloyvið verður givið:
Reguleringsfaktorurin verður settur til 0,5 (hinar 0,5 til byggiloyvið), annars verður skjalið tað sama.
Til fermetrar, at roknað gjaldið eftir, verður roknað samlaða víddin av $m^2$, sum kunnu byggjast á øllum grundstykkjunum tilsamans, við tí mest loyvda byggistigi, nettonýtslustigi ella rúmmáti, sum ásett er sambært byggisamtyktini fyri tey einstøku økini. Tað sum sambært byggisamtykt ikki verður roknað uppí hæddarvíddina, verður ikki tikið við í útrokningina fyri útstykkingargjaldið (smáhús upp til 35 $m^2$ íalt), men uppí byggiloyvisgjaldið.

Upplýst verður á rokningini um bygningsslag, PE-faktor, regulering, fermetrar og kostnaður íalt.

Dømi um gjøld eftir nýggja uppskotinum:

| | |
|---|---|
| Grundstykki í A1/A3, 500 $m^2$ (bygging 100+100+50) | kr. 24.938 |
| Grundstykki í A1/A3, 300 $m^2$ (bygging 80+80+40) | kr. 19.950 |

Skiftisreglur fyri gjald í sambandi við útstykkingarloyvi:
Skeringsdato fyri broytingini verður dagfestingin av góðkenningini av útstykkingini. Tó so, at tey sum hava fingið útstykkingarloyvi, sum ikki er útgingið, sleppa undan at gjalda eftir nýggju skipanini, men skulu gjalda eftir tí skipan sum var galdandi tá.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til, at broyta skipanina samsvarandi omanfyri standandi ískoyti.

Somuleiðis verður mælt til, at inngjøld fyri íbindingar verða bókaðar á serstakar konti fyri ávikavist kloakk, vatn og vegir, og at hesar framyvir innganga í vanligu rakstrar- og/ella íløgufíggingina av teimum útreiðslum sum kommunan fær í sambandi við at gera vegir og leggja veitingar fram til útstykkingar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. oktober 2011:** Ein meiriluti: Levi Mørk, Elin Lindenskov og Jákup Símun Simonsen taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen mæla til at íbindingargjaldið fyri kloakk og vatn verður 20,00 kr pr. $m^2$ av grundstykkja støddini.

**Tekniska nevnd 18. oktober 2011:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2011:** Málið útsett.

**Býráðið 20. oktober 2011:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2011:** Tekniski stjóri kunnaði um málið.

**Ískoyti:**
Sjúrður Olsen biður um málið á skrá.

**Figgjarnevndin 18. januar 2012:** Málið umrøtt.

Sjúrður Olsen biður um málið á skrá.

**Figgjarnevndin 18. januar 2012:** Málið umrøtt.

**Ískoyti:**
Íbindingargjaldið hevur verið álagt øllum borgarum í Tórshavnar kommunu, ið hava fingið/fáa byggiloyvi og harvið eru íbundin í vatnleiðingar, kloakkskipanir og vegir.
Henda praksis gongur rímiliga langt aftur í tíð. Kommunan metir, at fyrstu ferð gjald varð álagt, var umleið ár 1898.

Gjaldið hevur verið endurskoðað leypandi. Kommunan kann dokumentera býráðsavgerðir viðv. nevnda gjaldi aftur til 1942. Hin 27. oktober 1942 avger býráðið at hækka vatngjaldið frá kr. 6 til kr. 8. Nær tað ítøkiliga er ásett til kr. 6 er trupult at meta um.

Hin 31. mars 1969 samtykti býráðið at áleggja "Íbindingargjald" í sambandi við útflýggjan av byggiloyvum við gildi frá 1. apríl 1969, og hevur tað verið støðug siðvenja síðani 1969.

Samtykta gjaldið var í 1969 kr. 500,- fyri vatn og kr. 2 fyri fermeturin av húsastøddini, t.v.s. gjaldið er tvinnað saman av ávikavist vatngjaldi og stødd av bygging/lendi.
Í 1998 verður gjaldið aftur endurskoðað í mun til prís og samtykkir býráðið at hækka prísin til kr. 1.500 fyri vatn og kr. 10 fyri fermetrar av grundøki.

Gjaldið var óbroytt, til býráðið 31. januar í 2008 samtykti endurskoðaða gjaldið. Henda broyting viðførdi ein annan leist at rokna nevnda gjald eftir. Mett varð, at nýggi útrokningarhátturin frá 2008 vildi viðvirka til "rættvísari" gjøld og eisini tók hædd fyri nýggjari byggihættum, av eitt nú íbúðarbygningum í fleiri hæddum, eins og nýggi útrokningarhátturin er ætlaður at javnseta borgarar o.fl., soleiðis at tað ikki verður gjørdur munur á, um talan er um eina kommunala ella eina privata útstykking ella byggiætlan.

Støðuga og vanliga skipanin við at teingja íbindingargjald at byggiloyvum byrjaði so ella so fyri meira enn 100 árum síðani og hevur verið  hevur verið brúkt støðugt, í øllum førum sum vit kunnu dokumentera, síðani 1969.

Somuleiðis er talan um øki – s.s. vatn, kloakk og vegir, ið ikki eru fevnd av positivt orðaðari lóggávu, men liggur innan "kommunalu fulltrúina" at definera og skipa.

Sostatt er í mun til "íbindingargjaldið" heimildin í ávikavist rættarsiðvenju, ið er at meta sum sjálvstøðug rættarkelda, og í kommunalu fulltrúini. Løgdeildin vil í hesum føri vísa á dómin U 1988.352H (Dyrehavsbakken) fyri at vísa á parallellin við rættarsiðvenjum sum heimildargrundarlagi í mun til praktiserað gjøld, ið ikki eru positivt orðað í lóggávu.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Íbindingargjøld 2006-2011, sum eru inngoldin á konto fyri vatnleiðingar og kloakkir

| | 6710 Vatn | 6810 Kloakk | Íalt |
|---|---|---|---|
| 2006 | 324.000 | 724.935 | **1.048.935** |
| 2007 | 138.000 | 896.065 | **1.034.065** |
| 2008 | 46.000 | 316.933 | **362.933** |
| 2009 | 30.000 | 674.550 | **704.550** |
| 2010 | 37.500 | 276.840 | **314.340** |
| 2011 | 80.872 | 728.496 | **809.368** |
| **Íalt** | **656.372** | **3.617.819** | **4.274.191** |

Harumframt eru gjøld fyri aðrar íbindingar inngoldnar á sølukonto hjá kommununi.

**Tilmæli:**
Vísandi til umrøðuna av málinum á fíggjarnevndarfundi hin 7. des. 2011 og 18. jan. 2012, hevur stjórnin tikið samanum og mælir til, at politiska skipanin tekur støðu til fylgjandi broytingar og uppskot:

1. Útrokningarhátturin, har útgangsstøði verður tikið í slag og stødd av bygging, verður broyttur soleiðis, at gjaldið verður útroknað í mun til mest loyvdu bygging á hvørjum matrikli (nettonýtslustig), og eina prísseting av slag og stødd av leiðingum til hvønn matrikul, alt eftir hvat slag av bygging talan verður um.

2. Verður játtað frávik at byggja meira enn mest loyvda nettonýtslustig, verður gjaldið regulerað soleiðis, at goldið verður fyri allar bygdu fermetrarnar.

3. Útrokningarhátturin verður ikki galdandi fyri broytingar ella víðkan av verandi bygningum. Tó so at um broytingar av verandi bygningum viðføra, at nýggjar ella eyka leiðingar skulu leggjast til bygningarnar, rindar eigarin eftir rokning tað sum broytingin av leiðingum kostar.

4. Íbindingargjøld fyri øll sløg av kommunalum útstykkinginum og byggiætlanum verða innroknað í søluprísin av grundøkinum, soleiðis at helvtin av gjaldinum verður goldið, tá ið grundstykkini verða seld, og hin helvtin tá ið byggiloyvið verður útskrivað til hvønn einstakan bygning á hvørjum av grundstykkjunum.

5. Íbindingargjaldið fyri allar privatar útstykkingarætlanir fyri 2 ella fleiri grundstykkir verður goldið soleiðis, at helvtin av gjaldinum verður goldið tá ið útstykkingarloyvið verður útskrivað, og hin helvtin tá ið byggiloyvið verður útskrivað til hvønn einstakan bygning á hvørjum av grundstykkjunum.

6. Íbindingargjaldið fyri allar privatar byggiætlanir av húsum við fleiri bústaðar- ella nýtslueindum, so sum íbúðarblokkar, skrivstovubygningar, vinnubygningar o.l. verður goldið soleiðis, at helvtin av gjaldinum verður goldið, tá ið útstykkingarloyvið verður útskrivað, og hin helvtin tá ið byggiloyvið verður útskrivað til hvønn einstakan bygning.

7. Serlig mál, har ávísar byggingar viðføra serliga stórar útreiðslur fyri kommununa, verða viðgjørd einsæris, og kann kommunan í slíkum førum krevja gjald eftir rokning í mun til útreiðsluna.

8. Hesar broytingar fáa gildi frá tí tær eru samtyktar í býráðnum. Tó so at íbindingargjøld, sum eru roknað eftir higartil nýtta útrokningarháttinum frá 1. mai í 2011, verða roknað av nýggjum eftir nýggja útrokningarháttinum, og ov nógv goldið gjald verður afturrindað eigarunum.

At enda verður mælt til, at umsitingin ger uppskot til prísseting av slag og stødd av leiðingum til hvønn matrikul, alt eftir hvat slag av bygging talan verður um, soleiðis sum ásett í pkt. 1.

**Fíggjarnevndin 26. januar 2012:** Umsitingin ger útrokningar og uppskot um gjøld við støði í omanfyristandandi tilmæli, ið verður at leggja fyri næsta fíggjarnevndarfund.

**Býráðið 26. januar 2012:** Kunnað varð um málið.

**29/12** **2012-0221**

**Kommunala Brennistøðin: Bankatrygd fyri útflutning av roykburturkasti**

**Lýsing av málinum:**
Í sambandi við at Tórshavnar kommuna (Kommunala Brennistøðin) og IRF skulu útflyta roykburturkast til burturbeining á Langøya í Noregi, skal ein bankatrygd setast mótvegis Umhvørvisstovuni.

Tílíkur útflutningur/innflutningur av burturkasti ("grænseoverskridende transport af affald") verður reguleraður sambært ES-direktivi og skal góðkennast av myndugleikunum í avsendara- og móttakaralandinum. Ein av treytunum er, at avsendaralandið setur bankatrygd mótvegis móttakaralandinum. í hesum føri er talan um 910 kr/tons x 1100 tons = uml. 1 mió kr, sum Umhvørvisstovan setur mótvegis SFT í Noregi (Statens Forureningstilsyn).
Umhvørvisstovan krevur so samsvarandi bankatrygd frá formliga útflytaranum, sum er IRF (tí IRF og TK/KB hava avtalað samstarv um útflutningin), og IRF krevur so lutfalsliga bankatrygd frá Tórshavnar kommunu, ið er 42 % = **kr. 420.000**,-.

Síðani seinasta útflutning í 2010 er ES direktivið broytt, so at tíðin, sum trygdin skal vera galdandi, er broytt til eitt ár út um tíðina fyri notifikatiónina. Tað merkir, at trygdin skal vera galdandi frá 1. januar 2012 til 31. desember 2013.

Næsti útflutningurin verður væntandi í juni 2013, og tá skal so ein nýggj trygd setast, sum skal verða galdandi til 31. desember 2014. Væntandi skal Tórshavnar kommuna tá seta fulla bankatrygd á 1,0 mió kr, og so setur IRF lutfalsliga trygd mótvegis Tórshavnar kommunu fyri ávíst % tal.

Víst verður eisini til mál 2007-2267, 2008-4686 og 2010-1371.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Kostnaðurin fyri ábyrgdina er 3.000 kr., og leypandi provisiónin er 2% p.a, sum verður fíggjað av rakstri hjá Brennistøðini

**Skjøl í málinum:**
- Áheitan frá IRF um at seta bankatrygd, teldupostur 12. januar 2012
- Uppskot frá EIK til bankatrygd, teldupostur frá Judith Rubeksen til Bárð Michelsen, 20. januar 2012
- Ymiskt teldusamskifti millum Bárð Michelsen, Judith Rubeksen úr Eik og Hera Olsen
- Dømi um skjøl frá útflutninginum í 2009

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at góðkenna trygdina.

**Fíggjarnevndin 26. januar 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 26. januar 2012:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**FUNDUR LOKIN KL. 20:30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Sjúrður Olsen | Bogi Andreasen |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Annfinn Brekkstein | Inga Dahl | Levi Mørk |
| Rúni Djurhuus | Jákup Símun Simonsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |